## Eru enn á flogvøllinum

Fleiri av teimum 22 iraksku flóttafólkunum, sum vórðu send úr Danmark til Irak fyrr í vikuni, eru enn á flogvøllinum í Bagdad. Ein teirra, Shalaw Mohammed, sigur í telefonsamrøðu við stuðulsfólk í Danmark, at hann og 16 onnur flóttafólk eru enn á flogvøllinum, tí tey tora ikki at fara haðani. Martin Spang-Thomsen í felagsskapinum Kirkeasyl, sigur við kringvarpið DR, at hann skilir væl, at tey iraksku flóttafólkini eru bangin, tí at fleiri teirra eru í lívsvanda og hava onga framtíð í Irak.



## Tingið ósamt við ráðharran

Tingið í Skotlandi gjørdi í gjár vart við, at tað var skeivt av løgmálaráðharranum at lata libyska bumbumannin Mohamed al Megrahi leysan. Tá tingið atkvøddi um avgerðina hjá Kenny MacAskill, løgmálaráðharra, søgdu 73 tinglimir, at teir vóru ímóti avgerðini, 50 tóku undir við ráðharranum, og ein tinglimur atkvøddi blankt. Atkvøðugreiðslan hevði kortini onga ávirkan á málið, tí Megrahi er langt síðani farin úr Skotlandi til Libya. Kenny MacAskill valdi at lata libyska bumbumannin leysan, tí hann er deyðasjúkur av krabbameini.

# Børn við serligum tørvi verða flutt úr Danmark til Føroya

FYRISPURNINGUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Bergtóra Høgnadóttir Joensen, tingkvinna fyri Tjóðveldi, sigur í fyrispurningi til Rósu Samuelsen, landsstýriskvinnu í almannamálum, at hon hevur frætt um fleiri familjur, sum hava børn við serligum tørvi á stovni í Danmark, sum nú brádliga hava fingið boð um, at børnini skulu heimaftur til Føroya.

- Talan er um børn sum eru í skúla ella stovni í Danmark. Tað er ein trupul og svár avgerð fyri alla familjuna at lata barnið fara av landinum. Í flestu førum krevst bæði nógv tíð og orka hjá allari familjuni at taka og at rúma slíkari avgerð. Tá barnið er farið av landinum tekur aloftast eisini rúma tíð, til barnið trívist og støðast í nýggja umhvørvinum – fremmant mál, fremmand mentan, øðrvísi skúlatilboð og netverk, sigur Bergtóra Høgnadóttir Joensen.

Hon heldur tað tí tykjast vitleyst, um børn sum eru send av landinum, nú skulu heimaftur, uttan at støðan herheima er broytt almikið til tað betra.

Bergtóra Høgnadóttir Joensen vísir á, at Rósa Samuelsen undir viðgerini av løgmansrøðini segði, at vit ikki hava nógv tilboð til ung yvir 18 ár, og at tað tí í hesum samanhangi eisini verður hugt eftir, hvørjir manglar eru. Hon segði, at í løtuni hava vit eini 12 børn á stovnunum í Føroyum umframt tað eru 22 unglingar í Danmark, bæði innan forsorg og barnaforsorg.

»Flest øll hava brúk fyri einum tilboði eftir at tey eru liðugt viðgjørd í Danmark. Størsti trupulleikin er, at vit hava ikki nøktandi tilboð at bjóða teimum, so tey kunnu koma heim. Tey flestu av teimum ungu, innan barna - og forsorg, hava lítla og onga skúlagongd, og tað ger ikki støðuna hjá teimum betur. Støðan er tíverri tann, at tað er neyðugt at leingja uppihaldið í Danmark. Umframt tey sum eru í Danmark hava vit tørv á uml 40 búplássum bara til børn og ung«, segði Rósa Sameulsen undir viðgerðini av løgmansrøðuni.

- Landsstýriskvinnan vísti á nágreiniliga tørvin á búplássum hjá hesum børnum og ungu. Eisini sigur hon, at vit ikki hava nøktandi tilboð til teirra tá tey koma heim, sigur Bergtóra Høgnadóttir Joensen, sum tí vil hava landstýriskvinnuna at svara hesum spurningum:



*Bergtóra Høgnadóttir Joensen spyr um og hví familjur, sum hava børn við serligum tørvi á stovni í Danmark, nú brádliga hava fingið boð um, at børnini skulu heimaftur til Føroya*

Hvørjar eru mannagongdirnar, tá børn við serligum tørvi - sum hava verið uttanlands á stovni ella í skúla - flyta heimaftur til Føroya?

Er ein ætlan løgd fyri framtíðina hjá barninum, tá tað flytir heim?

Hvussu verður tryggjað, at áhaldandi menningin af fakligum og persónligum førleikum heldur áfram eisini eftir at barnið er flutt heimaftur til Føroya?

Hvussu langt áðrenn barnið kemur heim til Føroya fær familjan boð um hetta?

Kann avgerðin verða tikin miðskeiðis í einum skúlaári?

Hvør verður tikin til upp á ráð, tá hendan avgerðin verður tikin?

Er avgerðin sosialfaklig burturav?

Kann avgerðin vera pengalig?

# Soleiðis selur tú tónleik á netinum

**Føroya Tele og Tutl skipa fyri kunningarfundi fyri tónleikarum, um hvussu teir kunna selja sín tónleik á Planet.fo.**

Mikudagin kl. 19 bjóða Føroya Tele og Tutl øllum, sum hava givið tónleik út, til kunningarfund í hølunum hjá Føroya Tele í Klingruni í Hoyvík. Á fundinum verður kunnað um, hvussu tey, sum hava givið tónleik út, kunnu selja hann í tónleikahandlinum hjá Føroya Tele á Planet.fo. Umframt umboð frá Tutl og Føroya Tele verður eisini ein løgfrøðingur við, sum fer at kunna um tað løgfrøðiliga í samband við sølu av tónleiki.

Ætlanin hevur alla tíðina verið at fáa allan føroyskan tónleik savnaðan í tónleikahandlinum á Planet.fo, og hesin kunningarfundurin er eitt stig á leiðini at gera hetta til veruleika. Óli á Deild Olsen frá FT Online hevur góðar vónir til fundin og upplýsir, at fleiri hava vent sær til Føroya Tele fyri at fregnast um, hvussu tey kunna koma við í tónleikahandilin á Planet.fo.

Tutl hevur gjørt eitt stórt arbeiði fyri at fáa savnað føroyskan tónleik saman við Føroya Tele, og Bjørg Dam frá Tutl sigur, at tey longu hava sent kunningartilfar til fleiri av teimum, sum hava givið tónleik út, og afturmeldingarnar eru sum heild jaligar.

Tónleikarar kunna melda seg til tiltakið við at senda ein teldupost til odo@ft.fo ella við at ringja á 243011.